


**Nr. 17** ***17. august 2025*** **85. árg.**

# Hvat hevur tú?

Uttan mun til, hvussu lítið tú heldur, at tú hevur, gev so Gudi tað. Eingin sum Hann kann fáa okkurt stórt burtur úr tí, sum lítið er. Móses bleiv kanska størsti leiðarin nakrantíð, tá ið hann í 40 ár leiddi jødiska fólkið gjøgnum oyðimørkina til Lovaða Landið.

Hetta var ein ferð við nógvum trupulleikum, men tað var eisini ein ferð við dagligum undrum, har tey fingu mat, vatn og skógvar og klæðir, sum ikki slitust. Tey fingu ein eldstólpa at hita seg við um náttina – og eitt skýggj at verja seg móti sólarhita um dagin. Móses man hava hugsað aftur á tann dagin, tá ið hann móður, vónsvikin, gamal og málleysur stóð við stavi sínum framman fyri Gudi. Tað var har, at ferðin við øllum undrunum byrjaði:

Vil tað siga, at Gud brúkar ikki menniskju, sum hava høga útbúgving við nógvum førleikum at bjóða Gudi? Jú, sanniliga, Gud brúkar øll sløg av menniskjum. Men Gud vil ofta gera okkurt við tað menniskja, sum hevur nógvar førleikar, so hann ella hon ikki lítur á sínar førleikar, men á Gud.

Gud kundi havt kallað Móses, tá ið hann var 30 ár, ungur, sterkur og væl skúlaður í hovinum hjá Fárao. Men Gud bíðaði, til Móses var 80 ár og næstan liðugur. So vísti Gud, hvat ið Hann kann gera gjøgnum eitt sovorðið menniskja.

Saulus hevði høga útbúgving, ágrýtni og karismu. Men Guds kall til hansara, tá ið hann seinni fekk navnið Saul, gekk hond í hond við, at Himmalsins ljós myndaliga talað brendi Paulusar kunnleika og religión burtur. Frá tí løtu hevði Paulus bara eitt ynski: At kenna Kristus – og at gera Hann kendan. (Les. Áps. kap. 9 og Fil. 3,1-11).

Tá ið Saul úr Tarsus byrjaði sín ríðitúr til Damaskusar at seta tey kristnu í fongsul, var hann lærdur, erpin og hevði stórt sjálvsálit og var braneggjaður. Tá ið hann møtti Guds ljósi á ferðini, fall hann á knæ ræðslusligin og blindur – og í máttloysi bleiv hann eitt undurfult amboð í Guds hond. Hann skrivaði uml. 28% av Nýggja Testamenti.

*Effie Campbell* umsetti.

*Hvis vi alle tændte hver vor lampe*
*og lod den skinne klart.*
*Hvis vi alle lod vor lampe skinne,*
*ville Jesus komme snart.*
*For så mange vandrer i mørke omkring,*
*om Jesus ved de jo næsten ingenting!*
*Derfor lad os tænde vore lamper,*
*så de lyser rundt omkring!*

# Jesus er til øll menniskju

*Gina Gjerme*

Vit skulu brúka tíðina at tala og vitna. Tá ið vit ganga í trúgv, er tað Gud, sum hevur ábyrgdina av úrslitinum. Viðhvørt tekur tað tíð; men vit vita, at tað kann taka tíð, frá tí at sáðkornið fellur niður í jørðina, til tað fer at blóma.

Ferð eftir ferð síggja vit í Bíbliuni, at Gud er úti og leitar eftir tí eina. Hann vil, at øll fólk skulu koma til trúgv.

Gud hevur hjarta fyri øllum. Tá er eingin lagdur burturúr. Eg misti beiggja mín fyri einum ári síðani undir syndarligum umstøðum. Beint áðrenn hann doyði, fekk hann eitt møti við kristnu trúnna.

Hann sendi eini boð til mammu og skrivaði: „Mamma, veitst tú, hvat ið hendi við mær í nátt? Jesus kom inn á rúm mítt. Hann segði mær alt, sum eg hevði brúk fyri at hoyra. Nú veit eg, at Hann er veruligur, sendur av Gudi. Mamma, tú veitst ikki, hvussu stórt hetta er, men eitt er týdningarmikið: Jesus er ikki bara til tey kristnu. Hann er til øll menniskju!“

Latið okkum brúka orð, sum fólk skilja. Vit skulu brúka so einføld orð, at fólkið á gøtuni skilur, hvat ið hetta handlar um. Jesus sá hin einstaka. Latið okkum vera kirkja, sum sær og hevur áhuga fyri menniskjum.

*Effie Campbell* umsetti.

# Hvar finnur tú sálarfriðin?

Nú á døgum stríðast tey ungu, tey hava ongan sálarfrið og kenna seg innantóm. Er tað løgið, tá ið Gud er blakaður út úr skúlunum og mangar aðrar staðir?

Í sanginum „O, veldis Gud, eg undrandi má standa", ljóðar triðja versið so:

*„O, Gud, tá syndin særir sál og sinni,*
*eg nígi niður við tín náðistól;*
*HAR FYRIGEVING, SÁLARFRIÐ EG FINNI;*
*o, Gud, tú ert mín klettur og mítt skjól!"*

Í tveimum teimum síðstu reglunum í hasum versinum finnur tú svarið til at fá sálarfrið og fyrigeving. Hatta er lykilin til sálarfriðin.

Men í mong ár hevur tað verið so, at vit hava fingið okkum upplýsing og kunning úr fjølmiðlunum heldur enn frá Gudi. Bíblian liggur á hillini og savnar dust.

Dust á Bíbliuni er rustur á sálini!

*Effie Campbell.*

# Tað hendir beint fyri eygum okkara

*Moses Hansen*

Í sambandi við at Jesus ríður inn í Jerusalem, stendur í Jóh. 12,16: „Hetta skildu lærusveinar hansara ikki í fyrstuni; men tá ið Jesus var vorðin dýrmettur, tá mintust teir til, at hetta var skrivað um hann, og at teir høvdu gjørt hetta fyri hann." –Ja, ikki fyrr enn Jesus var farin aftur til Himmals, stóð tað greitt fyri teimum, at nógv av tí, Skriftin hevði boðað um frammanundan, var nú gingið út fyri eygum teirra.

Jødarnir høvdu fingið tað profetiska orðið litið upp í hendurnar – sama Orðið, sum vit eisini lesa. Boðað varð frammanundan umleið 300 ferðir um fyrru komu Jesusar. Zak. 9,9 var eitt av teimum: „Rópa av gleði, Zions dóttir, og fegnast tú, Jorsala dóttir: Sí, kongur tín til tín kemur; rættvísur er hann og sigursælur, lítillátur á asna hann ríður, á ungum øsnufola."

Hetta var skrivað 500 ár, áðrenn tað hendi Pálmasunnudag. Men flestu jødar sóu tað ikki. Tað, at teir fagnaðu Jesusi, var meir bygt á kenslur enn sannleikan. Tí rópti sami skari: „KROSSFEST HANN!" nakrar fáar dagar seinni – og JESUS

GRÆT UM JERUSALEM, av tí at tey ikki kendu vitjunartíð sína.“ Luk. 19,44. Knøpp 40 ár seinni lá Jerusalem og templið sundursorað. Sambært søgufrøðingin Josefus Flavius drupu rómverjar 1,1 mill. jødar og førdu 97.000 jødar til Róm sum trælir.

Profetiini ganga út fyri eygum okkara í hesum árum – ógvisligari í tali og styrki – enn nakað ættarlið hevur sæð síðani fyrru komu Jesusar fyri 2.000 árum síðani. Nú er talan um aðru konu hansara.

Hvussu fyrireika vit okkum? Vit skulu liva við Jesusi, sum sigur: „Frið lati eg eftir hjá tykkum, mín frið gevi eg tykkum; eg gevi tykkum ikki eins og heimurin gevur. Hjarta tykkara óttist ikki og ræðist ikki.“ Jóh. 14,27. „Tá ið eg eri farin burtur og havi tilbúgvið stað fyri tykkum, komi eg aftur og skal taka tykkum til mín, til tess at har sum eg eri, skulu tit eisini vera.“ Jóh. 14,3.

*Effie Campbell* umsetti.

# Eg fái ikki trúð???

**Astri Weber Gelein Laurendz var vertur í sendingini „Syng med“. Hon segði nakað soleiðis:**

Viðhvørt hoyrir tú fólk siga: „Eg kann ikki trúgva!“ Hatta passar ikki, hatta er ósatt. Jesus sigur: „Hvør, sum VIL VIL VIL, hann taki lívsins vatn fyri einki“ Opb. 22,17. Tað er ein viljasak, og tað er gratis. Í Jóh. 4. kap. sigur Jesus við konuna úr Samaria, at hon skuldi biðið hann um vatn, so hevði hann givið henni tað livandi vatnið (v. 10). Víðari sigur Jesus, at vatnið, sum hann gevur, skal verða ein kelda av vatni, sum vellir fram til ævigt lív (v. 14). Jesus leggur sjálvur trúnna inn í tað mannahjartað, sum kemur og biður Jesus um at fáa hitt livandi vatnið, og viðkomandi skal ongantíð tysta aftur. Hugsa nú um hatta!

*Effie Campbell.*

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | |
|---|---|---|---|
| 24. aug. | **Tekstur:** Mark. 10,13–16 | | **Bíbliuorð:** Mark. 10,14b |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74




**Nr. 18** ***31. august 2025*** **85. árg.**

# Er grøvin endastøðin?

*Moses Hansen*

Grøvin er bara endastøðin hjá likaminum. Í skapanini „myndaði Harrin Gud mannin av mold jarðar og blásti lívsanda í nasar hans, og soleiðis var maður til livandi skepnu.“ (1. Mós. 2,7) „… vita tit ikki, at likam tykkara er tempul heilaga andans, sum er í tykkum?“ (1. Kor. 6,19).

Lívsandin er frá Gudi – og livir ævigt. Hvar? Hjá Gudi – ella burtur frá Gudi. Eg var til jarðarferð hjá Ebbu. Hennara lív var Kristus. Tað kom eisini greitt fram gjøgnum tey orðini, sum hon vildi, skuldu lesast undir jarðarferðini. Hon visti, at grøvin bara var endastøðin fyri sítt lítla, skirvisliga likam, men at ein undurfull uppreisn kemur aftaná fyri hin Jesus-trúgvandi.

Í sínum testamenti hevði hon biðið um, at tríggjar gular rósur blivu kastaðar niður á kistuna – og at hesi skriftstøðini blivu lisin:

***Rósa 1: 1. Kor. 15,42…***
Tað, sum verður lagt í moldina, er forgongiligt; tað, sum rísur upp er **óforgongiligt!**

***Rósa 2: 1. Kor. 15,43a***
Tað, sum verður lagt í moldina, er virðisleyst; men tað rísur upp í **dýrd**!

***Rósa 3: 1. Kor. 15,43b***
Tað, sum verður lagt í moldina, er veikt; men tað rísur upp í **styrkleika**!

Hesi orðini við grøvina blivu lisin út frá 2. Tim. 1,9, sum bleiv lisið við kistuna inni í kapellinum: „Gud frelsti okkum og

kallaði okkum við heilagum kalli, ikki eftir gerningum okkara, men eftir síni egnu ráðagerð og náðini, sum okkum er givin í Kristi Jesusi.“

Ein jarðarferð við hesum innihaldi er ein dagur, har …
JESUS SIGRAR Á satani
LÍVIÐ SIGRAR Á deyðanum
LJÓSIÐ SIGRAR Á myrkrinum
NÁÐIN SIGRAR Á syndini.

*Effie Campbell* umsetti.

# Ein kærleiksfull kirkja – við kanti

*Holger Daugaard*

Á ársmøtinum á Himmerlandsgården var umrøðuevnið „Kærleiksfull kirkja – við kanti“. Summi hava helst hugsað nógv um, hvat ið meinast við „við kanti“. Merkir tað, at vit sum kirkja skulu vera meira greið og týðilig við okkara boðskapi? At kærleikin í okkara kirkju ikki skal vera útvatnaður og einkisigandi?

Í summum kristnum meinigheitum er boðskapurin um ein kærleiksfullan Gud vorðin so einkisigandi, at tey halda, at øll fólk verða frelst, uttan mun til, hvat ið tey trúgva, og um tey yvirhøvur trúgva. Tað er ikki tað, vit sum kirkja læra. Er tað tað, sum liggur í orðingini „við kanti“? Sum kirkja trúgva vit, at øll fólk fá**a tilboðið um frelsu. Jesu offur á Golgata fevnir um øll, og Hann kallar støðugt** á øll. Men tíverri eru tað ikki øll, ið siga: „Ja takk!“

*Effie Campbell* umsetti.

# Mótloysi

Ein kona, sum á ungum árum fór at arbeiða innan kristiligt virksemi, kendi seg mótfalna. Ein eldri maður segði tá við hana: „Hasin andin kemur ikki frá Gudi, tí Skriftin sigur: „Tí ikki gav Gud okkum mótloysis anda, men kraftar og kærleiks og hóvsemis anda.“ 2. Tim. 1,7. Nei, hatta mótloysið kemur frá í neðra, frá myrkursins fúrsta. Hann vil hava okkum niður við nakkanum.“

So gekk ein tíð, so hittust hesi bæði aftur. Maðurin spyr hana: „Nú, hvussu gongst?“ – „Nei, einki serligt. Tað koma so fá á møti.“ – Maðurin svarar: „Skriftin sigur ikki, at tá ið vit eru nógv á møti, tá skal eg vera mitt ímillum tykkara. Nei, hon

sigur: „Har sum tveir ella tríggir eru komnir saman í mínum navni, har eri eg mitt ímillum teirra.“ Matt. 18,20.

„Hasin maðurin hjálpti mær nógv í mínum andaliga arbeiði, tá ið eg var so ung og óroynd,“ endaði konan.

*Effie Campbell.*

# Viðrák – mótrák

Tá ið vit virka fyri Harran, so verður avleiðingin eisini, at vit møta mótstøðu. Paulus skrivaði: „Einar dyr eru mær opnaðar har, víðar og virkisfullar, og mótstøðumenninir eru mangir.“ (1. Kor. 16,9). Atfinningar eru eitt tekin upp á virðing. Um tú ikki hevði havt eydnuna við tí, tú tekst við, høvdu tey als ikki lagt merki til tín. Minst til, tað er tað størsta strevið og stríðið, sum gevur tann størsta sigurin. Satan sendir tær ikki eitt kort við lukkuynskjum, tá ið tú hevur avgjørt at gera Guds vilja. Hann fer at stríðast ímóti tær allan vegin. Men „tann, sum er í tykkum, er størri enn tann, sum er í heiminum.“ (1. Jóh. 4,4). Í dag er Gud í parti við tær, so sigurin er vísur.

*Effie Campbell* umsetti.

# Guds kærleiki er kraft – og uttan ótta!

Í Getsemane kallaði Jesus Judas „VINUR MÍN“, hóast hann sleiskur kysti Jesus og sveik hann. Ja, Orðið kallar Judas SVÍKJARIN, men Jesus kallar hann „**vinur mín**!“ (Matt. 26,45–50).

Einsamallur, svikin, vrakaður, háðaður, hildin fyri gjøldur, píndur og líðandi bað Jesus hesa bøn á krossinum: „**Faðir, fyrigev teimum**; tí at teir vita ikki, hvat teir gera!“ (Luk. 23,32–34). So ómetaliga sterkur og øðrvísi er Guds kærleiki. Um vit dagliga raðfesta felagsskapin við Faðir, Son og Heilaga Anda – og Orðið, so vil Guds kærleiki vera líka stórur í okkum. Vit vita tað kanska ikki. Kanska trúgva vit tí ikki. Kanska skuggar jantelógin fyri tí. Men veruleikin er, at um vit eru født av nýggjum, bera vit Guds kærleika innan í okkum, og hann kann smelta og broyta ísakøld hjørtu.

Rómverjabrævið 5,5 sigur: „Kærleiki Guds er útheltur í hjørtum okkara við heilagum anda, sum okkum er givin.“

Vit kunnu ikki røkka øll við evangeliinum, men øll kunnu náa ein. Áhaldandi bøn fyri einum menniskja er eisini at náa ein. Bið Heilaga Andan vísa tær eitt menniskja, sum tú regluliga skalt biðja fyri. Títt stríð fer ikki at vera nyttuleyst.

Og so hevur **Guds kærleiki** ta ómetaligu kraftina í sær, at hann **rekur út óttan**. Tað er ein ovurmikil náði og signing at eiga hesa kraft, sum rekur út ta pláguna, sum pínur menniskju í okkara tíð: Óttin (1. Jóhs. 4,18).

Bið um, at menniskju møta Guds kærleika í tær – eisini tey menniskju, sum tú hevur ringt við at umgangast. Ja, sjálvt tey, sum gera lívið stríggið fyri teg. Tá ið tað hendir, er Guds kærleiki fullkomin í tær, sum Jóhannes sigur tað í 1. Jóhs. kap. 4.

*Effie Campbell* umsetti.

# Fráfallin

Tveir trúgvandi menn sótu og tosaðu um trúnna. So sigur annar: „Hvussu ber tað til, at summi, sum vóru so brennandi undir vekingini í 70-árunum, ongantíð sóust aftur, hví fullu tey frá?“

„Ja,“ svaraði hin, „vit lesa í 1. Tim. 4,1: – Men andin sigur beinanvegin, at í komandi tíðum skulu summir **falla frá trúnni** og halda sær at villandi andum og lærdómum av illum andum.

Men eg skal siga tær, hví tey kólnaðu og fullu frá. Í 3. Mós. 6,6 stendur: „Eldurin skal altíð brenna á altarinum; hann má ongantíð kólna út,“ og í 5. v. stendur, at hvønn morgun mugu tey leggja við aftur at eldinum, so hann ongantíð kólnar út.

Soleiðis var tað í Gomlu Pakt, í Nýggja Testamenti er Guds orð, Bíblian, tann viðurin, sum heldur eldin brennandi. Hvønn dag skulu vit lesa eitt petti úr Skriftini, so okkara hjartaeldur ikki slóknar.“

*Effie Campbell.*

---

**Satan hevur tvær tvíburaplágur:** ótti og ivi. Gud harafturímóti gevur okkum trúgv og kærleika. Rópa harðari enn óttin: „Tað er fullgjørt!“ – „Óttast ikki, trúgv bara,“ segði Jesus.

*e.c.* ums.

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 31. aug. | **Tekstur:** | Luk. 8, 40–42 + 49–56 | **Bíbliuorð:** | Luk. 8,50b |
| 7. sept. | **Tekstur:** | Jóh. 6,1–15 | **Bíbliuorð:** | Jóh. 6,35 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74